# TAÐ ER TÍÐIN

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## Vinir fáa ung at taka rúsevni

Tá ungfólk taka sterkari rúsevni er tað ofta tí, at tey eru komin í eitt umhvørvi, har tað er vanligt at brúka rúsevni.

– Sosialir samanhangir eru avgerandi fyri, um fólk taka amfetamin ella kokain. Um tú kemur í eitt umhvørvi, har tað er vanligt at taka rúsevni í veitslum, er nógv størri møguleiki fyri, at tú sjálvur eisini byrjar at taka rúsevni, sigur Mads Uffe Pedersen, professari á lærda háskúlanum í Aarhus, við Berlingske.

Kanningar vísa, at tá fólk taka sterkari rúsevni, eru tað í 70-80 prosentum eisini vinir hjá teimum, sum taka rúsevni.

## Vit blíva sjúk av skitnum køliskápum

Flestu fólk vaska ikki nóg ofta køliskápið, og tað kann gera fólk sjúk.

Ein kanning, sum Interreseach hevur gjørt, vísur, at annarhvør dani vaskar køliskápið fýra ferðir um árið. Og tað er alt ov sjáldan, heldur samskipari á stovninum Fødevareregion Øst. Morten Lisby heldur, at skitin køliskáp kunnu hava við sær diarré, spýggju og álvarsamar sjúkur.

– Tað er vandamikið, um blámusoppur kemur í køliskápi orsaka av gomlum mati í einum vátligum umhvørvi. Blámusoppurin kann skapa eiturevni, sum eru vanamikil fyri kroppin, sigur hann við Søndagsavisen.

Hann sigur, at tað vandamiklasta í køliskápinum er grønmeti, sum sleppur at liggja leingi og spillast. Bleytar gularøtur og gomul epli kunnu verða sannar bakteriubumbur.

Morten Lisby mælir fólki til at tøma køliskápi og vaska tað eina ferð um vikuna.



## Android yvirhálar iPhone




Fartelefonir við Android skipanini hjá Google hava nú yvirhálað iPhone fartelefonirnar í USA. Greiningarfyritøkan comScore sigur, at tað verða nú fleiri Android enn iPhone telefonir seldar í USA. Men Android og iPhone eru bert nummar tvey og trý í USA, tí BlackBerry fartelefonin er tann best umtókta millum amerikanarar. Hinvegin gongur tað skeivan vegin hjá BlackBerry, tí telefonin missir burtur av sínum marknaðarparti og roknað verður við, at BlackBerry skjótt fer at missa støðuna sum best umtókta fartelefonin hjá amerikanarum.

## Beavis & Butt-head gera comeback




Í 1990'unum vóru teir tiltiknir. Teknaðu tannáringarnir gjørdust heimskendir á sjónvarpsrøðini MTV, har teir gjørdu um seg í fýra ár. Beavis & Butt-head høvdu sínar hugsanir um tað heila, og teir vóru ongantíð sum hini. Nú verður sagt, at Beavis & Butt-head gera comeback á MTV seinni í ár. Mike Judge skal framvegis standa við róðrið í framleiðsluni av røðini.

## Nýtt koppingarevni ímóti beinkrími

Granskarar á Jenner Instituttinum á lærda háskúlanum í Oxford halda seg hava funnið fram til eitt slóðbrótandi koppingarevni ímóti beinkrími. Granskararnir siga, at nýggja koppingarevni kann virka ímóti fleiri ymiskum sløgum av beinkrími og kann halda í 10 ár. Hetta skriva blaðið The Telegraph. Beinkrím rakar á hvørjum ári milliónir av menniksjum og túsundtals fólk doyggja av sjúkuni. Í Danmark verður mett, at eini 1000 fólk doyggja á hvørjum á av beinkrími. Royndirnar hjá granskarunum í Oxford skulu nú roynast umaftur, og úrslitið verður í næstum kunngjørt í læknaligum tíðarriti.

